Í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein



# Nógvir amerikanarar í gegli

USA liggur langt fremst í eini uppgerð yvir heimsins fangar. Fimm prosent av heimsins íbúgvum búgva í USA, men 25 prosent av øllum fangum sita í fongsli í USA. Ein bretskur stovnur hevur gjørt upp, at umleið 2,3 milliónir amerikanarar sita í gegli. Orsøkin skal vera, at amerikanarar hava strangar lógir og reletivt nógvan kriminalitet.



# Vunnu 108 milliónir



Eitt svenskt par hevði ilt við at trúgva sínum egnu eygum, tá ið tey í farnu viku kannaðu lotto-seðilin hjá sær. Tað vísti seg nevniliga, at tey vóru einsamøll um at vinna høvuðsvinningin, sum var heilar 135 milliónir svenskar krónur – svarandi til umleið 108 milliónir danskar krónur. Hetta er størsti lotto-vinningurin, sum er vunnin í Svøríki.

Svenska parið hevði valt sær tølini í lotto-dráttinum eftir at hava lisið eina grein um, hvørji tøl oftast koma fyri í dráttinum.

# Meira Beerly Hills

Í 1990'unum var sendirøðin Beverly Hills 90210 ein av teimum heilt stóru, og nú verður arbeitt við at taka hesi sendirøð uppaftur. Maðurin, sum stóð aftanfyri upprunaligu sendirøðina, Darren Star, er sjálvur farin í holt við fyrireikingarnar til nýggja sendirøð, og fleiri av teimum gomlu sjónleikarunum hava játtað at verið við. Hetta skrivar IMDB News. Tað er ikki komið fram, hvat nýggja sendirøðin fer at snúgva seg um, men roknað verður við, at Beverly Hills 90210 verður aftur at síggja í amerikanskum sjónvarpi síðst í hesum árinum.

# Madonna er rúkandi heit

Hóast hon er nærkast teimum fimmti, er tað eingin onnur poppstjørna, sum í løtuni megnar at fylgja við Madonnu. Hon hevur júst givið sína 11. studiofløgu út, og fløgan selir stórt kring allan heimin. Í farnu viku var Madonna ovast á hitlistum í 12 ymiskum londum – millum annað á tí týðandi bretska hitlistanum.




# Lunkað ummæli

**Um eina lítla viku verður nýggi filmurin um Indiana Jones frumsýndur kring heimin, og stórur spenningur er um filmin. Ein ummælari, sum sigur seg hava filmin, gevur filminum lunkað ummæli. Hann heldur, at hetta er filmurin, sum mann stúrdi fyri, tí hann er als ikki so spennandi, sum undanfarnu filmar, og hartil spæla sjónleikararnir heldur ikki líka væl.**

